

## Eivør er nummar eitt

Fløgan Mannabarn hjá Eivør Pálsdóttir er nummar eitt á listanum yvir mest seldar fløgur í Íslandi, eftir at hon kom beinleiðis inn á 5. pláss fyri 14 døgum síðani. Í síðstu viku var Mannabarn nummar tvey á listanum. Tá var fløga nummar eitt ein fløga hjá Magna, ið er íslendskur sangari, ið nú er kendur víða um, eftir luttøku í amerikonsku reality sendingini Rock Star Supernova.Heimmildarmaður okkara í Íslandi, Jens Guð, sigur, at fløgan hjá Magna verður førd fram í stórum lýsingarherferðum. Fløgan hjá Eivør verður hinvegin ikki førd fram á sama hátt, men liggur tó á fyrsta plássi nú á listanum yvir mest seldu fløgur í Íslandi.

## Salt spælir eykakonsert

Útgávukonsertin hjá sangbólkinum Salt í í Norðurlandahúsinum sunnudagin 16. september er longu útseld, og tí verður skipað fyri eykakonsert klokkan 22 sama kvøld. Sølan av atgongumerkjum til eykakonsertina byrjaði leygardagin. Tey kunnu keypast í Norðurlandshúsinum, beinleiðis á HYPERLINK "http://www.nlh.fo" \o "blocked::http://www.nlh.fo/" www.nlh.fo ella í kunningarstovunum í Fuglafirði, í Runavík og í Havn.

# Arbeiða enn við kvinnulista

**Neyðugt er at fáa inn í lógina, hvussu listaatkvøður skulu teljast. Tí fer Javnstøðunevndin at senda rættarnevndini bræv um hetta ein av døgunum**

JAVNSTØÐA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*Javnstøðunevndin ein av komandi døgunum fer at senda rættarnevndini í Løgtinginum bræv, fyri at fáa nevndina at samtykkja, at listaatkvøður sambært grein 18 í vallógini, skulu teljast saman innanhýsis í flokkinum*

Ætlanin er, at greiða skal vera komin á spurningin um listaatkvøður beinanvegin, so kvinnulistar verða veruleiki longu komandi valg.

Kári á Rógvi, formaður í Javnstøðunevndini, heldur, at kvinnulistar eru ein møguleiki at fáa eina rættvísari umboðan í tinginum. Tí fer Javnstøðunevndin ein av komandi døgunum fer at senda rættarnevndini í Løgtinginum bræv, fyri at fáa nevndina at samtykkja, at listaatkvøður sambært grein 18 í vallógini skulu teljast saman innanhýsis í flokkinum. Hóast onki stendur í vallógini um, hvussu listaatkvøðurnar skulu teljast upp, so hevur verið vanligt fyrr, at listarnir taldu hvør í sær. Hetta kann hava við sær, at listaatkvøðurnar einans koma toppskorarunum og flokkinum annars til góðar, og ikki kvinnunum, sum ætlað.

Formaðurin í Javnstøðunevndini greiðir frá, at hóast kvinnurnar fingu úti við 30 prosent av atkvøðunum síðsta valg, so eiga tær bert 9 prosent av umboðanini á tingi. Hetta er úrslitið av einari valskipan, sum útilokandi tekur landafrøðilig og ikki kynslig atlit. Tí eiga atkvøðurnar til serstakir paralellir kvinnulistar veruliga at koma kvinnunum til góðar. Men av tí at ógreitt er, hvussu listaatkvøðurnar skulu teljast upp, hevur ivi stungið seg upp um kvinnulistar í veruleikanum eru eitt tvíeggjað svørð.

- Tað er ógreitt, hvussu atkvøðurnar hjá tveimum listum í sama flokki, verða taldar saman.

Fyrr eru atkvøðurnar taldar upp hvør sær, tá ið teir umdømisvaldu tinglimirnir skulu finnast, men teir eru taldir saman, tá ið eykalimirnir skulu finnast. Sostatt verða listarnir uppfataðir sum tveir ymiskir listar. Men, tá ið eykalimirnir skulu býtast, verða allar atkvøðurnar taldar saman. Tá kann avleiðingin vera, at ein eykalimur, sum til dømis er úrslitið av einum kvinnulista í Havn, fellur til ein eykamann onkra heilt aðrastaðni, sigur Kári á Rógvi.

Stillar ein flokkur ein alternativan lista upp, kann tað sostatt hava við sær, at flokkurin missur umboð á tingi, men tað kann eisini føra til, at hann vinnur.

# Snartalv-kongur

**Fjórða árið á rað, fór ungi altjóða meistarin Helgi Dam Ziska við sigrinum, tá ið FM í snartalvi varð leikt í Havn leygardagin**

TALV
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Endaliga úrslitið av FM í snartalvi, sum var í Pálsstovu í Havn leygardagin gjørdist, at Helgi D. Ziska fekk 17½ stig, meðan John Rødgaard og Olaf Berg fingu hvør síni 13½ stig.

Spenningurin var stórur undan kappingini, um unga stjørnuskotið innan telving, 17 ára gamli Altjóða Meistarin í Talvi, IM Helgi Dam Ziska úr Havn, fór at megna at vinna FM í snartalvi fjórða árið á rað.

Har var ongin ivi: Telvað vórðu 18 talv og Helgi vann FM óvanliga sannførandi við 17½ stigi.

Teir telvarar, sum stóðu seg betri enn væntað, vunnu eisini virðislønir: 1) Rógvi Egilstoft Nielsen, 2) Høgni Egilstoft Nielsen, brøður og báðir úr Sandavági og 3) Jóhan Rói Mortensen úr Sundalagnum, Talvfelagnum Róki.

